

# The Helsinki Strings vitja aftur

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Tað var á stóru norðurlendsku NMPU (Nordisk Musikpædagogisk Union) kongressini 1977 í Örebro í Svøríki, at tað seinni so gitna finska orkestrið Helsinki Ungdomsstråkare á fyrsta sinni gjørdi vart við seg uttanlands. Á hesari stevnu vóru úrvald orkestur og tónleikabólkar úr flestu Norðurlondum at hoyra, men hetta nýggja orkestrið úr Finlandi bar av øllum.

Í 1984 var Kodaly-seminar í Haslev í Danmark. Zoltan Kodaly var í sínari tíð saman við Béla Bartok fremstur millum tónaskøld í Ungarn. Umframt sítt aðalvirksemi sum skapandi listarmaður bygdi hann upp eina tónleikafrálæruskipan, sum gjørdist heimskend. Stovnarnir av áðurnevnda orkestri brøðurnir Géza og Csaba Szilvay, sum hava sítt tónleikastøði úr heimlandinum Ungarn, vóru við á hesum námskeiði, og høvdu orkestrið við sær. Hesaferð vóru vit fleiri føriskir musikkskúlaleiðarar, sum m.a. upplivdu hetta orkesturspæl, ið tók øll lurtandi rættiliga av fótum.

Við eitt høvi komu vit at hitta teir á máli, og tað førdi við sær eina minniliga orkesturvitjan í Føroyum árið eftir. Í Norðurlandahúsinum hoyrdu vit tá ein strúkaraljóm, ið, hóast spælarnir vóru ungdómar í 12-17 ára aldri, neyvan hevur verið at hoyra fullbornari síðan. Og ikki bert tað, men vit undraðust stórliga, tá leiðarin Géza Szilvay greiðandi frá sínum arbeiðslag fekk slíkt tónleikaligt endurljóð frá tilvildarliga valdum børnum í salinum, sum tú ikki hevði hildið at vera møguligt.

Jú, bæði her í Havn og aðrastaðni, har tey vitjaðu, vóru fólk hugtikin. Men hugtiknir vóru gestirnir eisini – av landi, fólki og teim tónlistarligu menningarmøguleikum, tey hildu seg varnast her. “This can be the best in the world”, hevði Szilvay fyri munni – ivaleyst eisini havandi í huga, at landaøkið er so avmarkað og tí lætt at heildarávirka. Hetta hevur hann meira enn einaferð borið fram síðan, og frá framkomnum tónlistarfólkum, ið sum ungdómar tá vóru við á ferðini, hevur tað verið endurtikið, at av øllum orkestursins vitjanum víða um heim stendur Føroyaferðin í 1985 í einum heilt serligum minnisljósi.

Og nú koma tey aftur. Tað samband, sum tá varð knýtt til henda finska tónlistarheim, hevur ført við sær, at tað eftir summarfrí verður farið undir eina skúlaroynd í Havn eftir ungarsk-finska mynstrinum. Tað hevur gjørt sítt til, at flaggskipið innan finska strúkarauppalingina The Helsinki Strings kemur higar á vitjan mánadagin 15. juni.

**Konsertætlanin er henda**

Týsdagin 16. juni
Kl. 10 Skúlakonsert í Norðurlandahúsinum
Kl. 19.30 Almenn konsert í Norðurlandahúsinum

Mikudagin 17. juni
Kl. 20 Konsert í Fuglafjarðar Kirkju

Hósdagin 18. juni
Kl. 11 Skúlakonsert í Christianskirkjuni
Kl. 20 Almenn konsert í Christianskirkjuni

# Tarira framførir Heimstónar í stásiligum hølum

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Tvey stásilig høli verða karmar um konsertinar hjá Tarira 29. og 30. mai. Fríggjadagin 29. mai 19:00 verður konsert í Müllers Pakkhúsi. Og leygardagin 30. mai 17:00 verður konsert í Mentanardeplinum í Runavík.

Tarira gleðir seg til at royna nýggju hølini í Runavík. Tað er altíð spennandi at royna nýggj høli, og nógv gott hevur verið at hoyra um hesa nýggju mentanarperluna í Eysturoynni. Tarira hevur í hvussu er í hyggja at fáa tað besta burturúr ljóðeginleikunum, ið hølini bjóða. Vónandi eru nógvir eysturoyingar, ið koma við á hesa tónlistarligu rannsóknarferð saman við Tariru.

Müllers Pakkhús og Tarira eru hinvegin at meta sum góðir, gamlir vinir, ið altíð hava tað hugnaligt saman. Hetta er av góðum grundum, tí tað eru helst fá høli, ið eru so væl egnað til tað slagið av kenslubornum tónleiki, ið Tarira hevur lagt seg eftir seinastu árini. Tað var eisini upplagt, at konsertin í sambandi við útgávuna av fløguni Døgg varð hildin her í fjør summar.

Fløgan Døgg fæst sjálvandi eisini til sølu á báðum konsertum.

**Verk úr níggju ymiskum londum**

Sangskráin ferðast hesaferð ikki so langt aftur í tíð sum Tarira annars er kent fyri. Eingin endurreisingartónleikur á hesum sinni. Elsti satsturin hesaferð er av mæta russiska tónaskaldinum Igor Stravinsky (1882-1971), so harvið má sigast, at talan er um ein rættiliga modernaða konsert.

Men tað konsertirnar ikki bjóða av søgu, bjóða tær í staðin av geografi. Leitað verður um allan heim eftir íblástri. Við støði í Føroyum verður vitjað í okkara grannalondum, Íslandi, Svøríki, Finnlandi og Danmørk. Farið verður víðari eystureftir til Eysturríkis og Russlands og heilt yvir til víðagitna japanska tónaskaldið Toru Takemitsu (1930-1996) og tvørtur um Kyrrahavið til Los Angeles, har vit syngja ein yndisligan sats av unga stjørnuskotinum Eric Whitacre (føddur 1970).

Alt hetta fyri einans 75 krónur. Og ikki er neyðugt at fara longur enn til Runavíkar ella til Havnar fyri at fáa ein smakk av Heimstónunum hjá Tarira.


